# Kjak



Jóna Mortensen

## Eksklusiv kenning ella ikki?

Nú talan er um at lata eina eksklusiva søludeild við rúsdrekka upp í SMS, havi eg hug at til at koma við nøkrum viðmerkingum.

Sum skilst kemur ov lítið av peningi inn í Rúsuna og tí er ætlanin at royna at bøta uppá hetta við einari eksklusivari søludeild í SMS.

Eg haldi at um ein skal víðka markið útum tað sum nú er, also at tað skal seljast rúsdrekka aðrastaðni enn í Rúsuni og Havnadali, so eigur tað at verða soleiðis at øll skulu hava sama møguleika at fáa fatur á rúsdrekka, eksklusivt ella ikki.

Í danskari orðabók er hendan tíðing um orðið *eksklusiv* "eksklusiv betyder ifølge Den Danske Ordbog (bd. 2, 2004) 'som kun omfatter eller gælder de få særligt udvalgte og udelukker alle andre' eller en særlig målgrubbe

Tað kann gott vera at tað er eksklusivt at fáa eina fína fløsku av víni afturvið tí reyða búffinum eitt fríggjakvøld. Men tað hava ikki øll ráð til og kanska er ein køld øl afturvið fiskaflakinum tá líka esklusivt. Tað er heilt í lagi at lata eina eksklusiva deild upp, men tað má ikki verða so at tey sum ikki hava ráð til at keypa har, hava verri við at skaffa sær tað sum tey nú hava ráð ella hug til. T.v s. skulu niðan í Rúsuna ella út í Havnadal at keypa tað. Antin skulu øll ið vilja keypa rúsdrekka niðan í Rúsuna ella út í Havnadal, ella má man selja alt í SMS, um tað so verður ein ella tvær deildir. Hitt er at gera mun á fólki.

---



Annfinn Brekkstein
*býráðslimur fyri Sambandsflokkin*

## Ávara móti tyngjandi lántøkum og vantandi langtíðarætlan

Í kvøld hevur Tórshavnar Býráð fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2011. Minnilutin í býráðnum ætlar at viðgera fíggjarætlanina konstruktivt saman við meirilutanum til gagns fyri borgararnar í kommununi.

Men vit harmast um, at eingin langtíðarfíggjarætlan er gjørd fyri komandi árini. Vit sakna eina langtíðarætlan til tær íløgur, sum partvíst eru samtyktar í býráðnum, eitt nú brúgvin um Sandá, Musikkskúlin og fótbóltsvøllurin í Hoyvík, bara fyri at nevna nøkur dømi.

Tað tykist eisini eitt sindur ódámligt, at ongar ætlanir eru um at minka um skuldina hjá kommununi, tí lagt verður upp til at læna pening til avdráttir í 2011. Tórshavnar Kommuna ætlar sambært framløgdu fíggjarætlanini als ikki at rinda avdráttir upp á tikin lán, men bert rinda rentur. Hatta merkir, at kommunan skal út og læna upp í 17 milliónir kr. næsta ár til at rinda avdráttir fyri. Bara renteútreiðslurnar í 2011 verða næstan 12 milliónir krónur.

Havast má í huga, at skattaprosentið er hækkað tvær ferðir undir hesari samgonguni, samstundis sum lániskuldin er komin upp á 176 milliónir krónur.

Um kommunan framhaldandi skal hava eitt gott gjaldføri, verður allarhelst neyðugt at lána seg til tøkan pening í 2011. Um hetta gerst neyðugt, kemur samlaða lániskuldin hjá kommununi heilt upp í 225 milliónur krónur í 2011.

Alt bendir á, at neyðugt verður við slíkum gjaldførisláni, tí sambært seinastu útmeldingunum, kemur Tórshavnar Kommuna út úr 2010 við einum halli upp á 51 milliónir krónur. Tá kommunan brúkar meira pengar enn tað koma í kassan, so eru ikki so nógvir aðrir møguleikar, enn at troyta lánimarknaðin.

Meira vit læna, minni verður frælsið hjá kommununi til íløgur og allar tær stóru avbjóðingarnar, sum liggja fyri framman.

Hesar tankar ætla vit at taka við, tá býráðið hóskvøldið vónandi í semju kann viðgerða fíggjarætlanina fyri 2011 fyrstu ferð.

---



Edva Jacobsen
*løgtingskvinna*

## Hví má sparast í vælferðartænastum?

Í 2001 var Føroya fólk vitni til størsta politiska brølara, sum er gjørdur í nýggjari tíð, við tað at fullveldissamgongan minkaði inntøkusíðuna í landsbúskapinum við eini fruminntøku upp á 366 mió kr.

Hetta svarar til:
1 mió pr dag
7 mió pr viku
Ella 30 mió pr mðr

Bert fyri at lýsa, hvussu stór hendan upphædd er.

*Hugsið tykkum, hvat hesar inntøkur kundu verið nýttar til?*

### Yvirtikin mál

Hetta var tá skúlamál og forsorgarmál blivu yvirtikin pr. 1/1-2002.

### Sera dýrt fyri landskassan

Hesin niðurskurður hevur higartil kostað landskassanum 3.233 mió. krónur, umframt fastfrystingina

### Skerdar vælferðartænastur

Blokkniðurskurðurin rakar sera hart, og tað eru nógv, ið merkja avleiðingarnar av hesum niðurskurði, tí ógvusligar sparingar merkja skerdar vælferðartænastur, sum rakar øll, sum hava brúk fyri almennum tænastum.

Sum dømi kunnu nevnast nøkur øki:

- Tey gomlu, tey sjúku, tey sum eru óhjálpin
- Tey sum bera brek og teirra familjur
- Tey einsamøllu, børn og ung

Soleiðis kundi eg blivið við at tikið fram økir, sum verða sera meint rakt av skilaeysum avgerðum, gjørdar í óðum verkum, uttan at hava nakra inntøku at seta inn í staðin.

### Ábyrgdarleyst

Hetta er sera ábyrgdarleyst og orsøkin til at sparast má á øllum økjum í landinum við skerdari vælferð sum avleiðing.

---



Eyðun á Borg
*á Borg á Argjum í klippingsól 2010*

## Forhobentliga stadigvekk natúrlig(ur) útvikling(ur)

*ella: Vónandi framvegis natúrlig menning*

**HVAT ER FØROYSKT?:** Kunnu báðir setningarnir góðtakast sum føroyskt mál? Hvør setningur er vakrari, snøggari, natúrligari? Eru donsk orð føroysk, sjálvt um vit hava føroysk orð, sum merkja tað sama?

Um so er, so man ikki vera neyðugt at hava málrøkt, at royna at fjálga um móðurmálið.

**VÍÐGONGDIR DANISTAR:** Tað loysir seg neyvan at kjakast við so víðgongdan danist ella láturverju danamáls.

**BETINGILSI OG FLØTI:** Í skúlanum royni eg at mæla næmingum til at brúka tey løttu og stuttu, føroysku orðini, treyt og rómi, heldur enn tey donsku. Er tað ikki púra natúrligt?

Sambært danistum man slíkt ikki vera neyðugt, tí vit skulu bara góðtaka "ta natúrligu útviklingina" ella kanska "tann natúrliga útviklingin", sum neyvan er so natúrligur, tá samanum kemur.

**FØROYSKT OG DANSKT:** Føroyskt er føroyskt, og danskt er danskt. Tað er hent at duga danskt, men vit mugu endiliga ikki blanda bæði málini saman í ein vavgreyt, sum tíverri mangan verður gjørt.

**PÚRA SAMDUR:** Í greinini um fløkjumál verður skrivað, at "tað, sum kemur fyrst fram í hugaheiminum, er danskt", og "problemið er, at Føroyar hava verið undir donskum valdi so leingi".

Júst so, men tað átti at fingið okkum at røkt okkara móðurmál uppaftur betur!

**E.S.:** Hevur "stadigvekk" ikki g? Latum okkum? Hví knappliga so forn? "Ana": vera so dánt á lívi.

*Við blíðari og argari málkvøðu*